# – Tað er altíð gott veður flaggdagin

*Eirikur Lindenskov*

Hendan yvirskriftin kann kanska ljóða í so national-romantisk, men soleiðis er hon als ikki meint. Seinastu 11 árini hevur altíð verið gott veður flaggdagin – í øllum førum so nøkulunda – ta løtuna, vit hava sýnt fram ellisakførini.

Í ár var einki undantak í so máta. Eins og undanfarin ár møttust akførini kl 14, hesaferð tó á Shellstøðini við Ringvegin, fyri síðani at koyra raðkoyring oman á Kongabrúnna, har akførini seinastu árini hava staðið, meðan flaggdagshaldið hevur verið.

Tá røðan er hildin og sangur sungin og marsjur spældur, verður koyrt avstaðaftur áðrenn tey fimu í Bragdinum byrja renningina.

Talið av akførum hevur seinstu árini ligið um 20 bilar og 20 motorsúkklur.

Á Shellstøðini við Ringvegin var mikil blíðskapur. Har varð boðið kaffi og wienerbreyð til tey vaksnu, meðan børnini fingu sunkist og ís.

Tað er vanliga stórur áhuga hjá fólki at síggja gomlu bilarnar og súkklurnar, og høvi var eisini at kjósa vakrasta akfarið, ein bil og eina súkklu. Sum vera man, var tað ein av bilunum hjá Hans Elmari, ið vann heiðurin, eins og súkklan hjá Hans Paula Joensen á Argjum.



*Tvey ættarlið av Mercedes: 200 hjá Heina á Borg frá 1966 og 190 hjá Niels Paula Hjaltalin frá 1961*



*Tvey ættarlið av Ford: 20 M og Cranada*



*Nøkur av nýggjaru ellisakførunum, sum vóru við í raðkoyringini flaggdagin. Mercedes 200 frá 1966, Volvo Amazon, Mercedes 190 frá 1961, VW Bobla frá 1974 og Opel Kadett frá 1973*



*Hesin Ford Á Coupé hjá Vatnsoyra Bilasavni er frá 1931*



*Bilarnir vórðu sýndir fram niðri á Kongabrúnni. Hesir sanda undir Ósástovu: Ferrari hjá Atla Simonsen, Rolls Royce hjá Rasmusi Magnussen, Ford A Coupé hjá Vatnsoyrar Bilsavni, Chevrolet hjá Vatnsoyra Bilasavni og Mercedes 190 hjá Niels Paula Hjaltalin – uttast til vinstru ein Standard Vanguard*








*Eftir hondini eru nóg mikið av Triumph Spitfire Mark IV til ein klubba fyri seg. Nú hava Eirikur, Ingi og Hans Jørn hvør sín. Hetta er tann hjá Hans Jørn*

*Geir Wardum, sum er leiðari á Shellstøðunum í Havn, sýndi felagnum blíðskap við kaffi, wienerbreyðum og onkrum góðum til børnini eisini. Her verða heimstrupulleikarnir loystir: Júst Sivertsen, Geir Wardum, Atli Simonsen og Niels Pauli Hjaltalin*



*Chevrolet hjá Vatnsoyrar Bilasavni frá 1931*



*Hesa bobluna hevði ein breti, ið starvaðist á Bilasøluni Norrøna við sær úr Bretlandi. Nú eigur Rúni Nielsen hana. Hon hevur ein Porrche motor*



*Boblan hjá Katrin Joensen av Argjum er ein av teimum seinastu, ið framleiddar vóru. Hon sær út sum fyrsta dagin - sum alt hjá »teimum á Argjum…«*